# Vidic kann fá CL-leikbann

Serbiski verjuspælarin Nemanja Vidic varð vístur av vøllinum, tá ið Manchester United spældi heimsfinalu í Japan um vikuskiftið. Og nú kann útvísingin kosta Vidic leikbann í Champions League dysti. Reglarnar hjá UEFA og FIFA siga, at útvísingar í slíkum dysti kunnu hava við sær, at spælari fær leikbann í eitt nú Champions League. Í ringasta føri kann Vidic fáa leikbann í tríggjar dystir.



# Ongland hevur góðan kjans

Forsetin fyri altjóða fótbóltssambandið FIFA heldur, at Ongland hevur góðar møguleikar at gera vertur fyri HM-endaspælinum í 2018. Roknað verður við, at kappingin verður spæld í Europa, og Ongland kappast við Spania, Russland og Benelux-londini um vertsskapin. - Ongland er ein sterkur kandidatur, tí fótbólturin stendur so sterkur har, men kappingin er opin, sigur Sepp Blatter sambært Sky Sports.

# Holyfield gevur ikki upp

**46 ára gamli Evander Holyfield sigur seg framvegis hava vónina um, at hann kann endurvinna HM-heitið í nevaleiki**

BOKSING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við dómaraatkvøðunum 114-114, 116-112, 115-114 vardi russiski Nikolai Valuev sítt heimmeistaraheiti í tungvektsboksing, tá hann leygarkvøldið boksaðikst móti 46 ára gamla Evander Holyfield

Hóast tapið, so er eingin ivi um, at Evander Holyfield prógvaði, at tað framvegis er dugur í boksihandskum hansara. Fyrstu umgangirnar hevði amerikumaðurin gott tak á russiska risanum, men sum umførini gingu, gjørdust beinini heldur tyngri. Og við fyrimuninum, sum russin hevði í longu ørmunum, gjørdist talan um ein sera krevjandi dyst hjá Holyfield.



*Evander Holyfield fekk uppfylt dreymin um at gerast heimsins elsti heimsmeistari í tungvekt nakrantíð. Leygardagin tapti hann upp á stig móti russiska risanum, Nikolai Valuev. Men sjálvur sigur Holyfield, at hann ætlar sær at fáa ein nýggjan dyst um HM-beltið*
Mynd: Polfoto/AP

Sjálvur valdi Valuev eisini at gera eitt lítið bukk í virðing fyri Holyfield, tá dysturin var av. Hann hevði dystast móti einum av stóru legendunum í tungvektsboksing, og hann mátti eisini ásanna, at hóast 44 kilo, 24 sentimetrar og 11 ár í fyrimuni, so noyddist hann at stríðast í samfullar 12 umgangir.

## Gevur ikki upp

Evander Holyfield segði eftir dystin, at hann var vónbrotin.

- Eg eri vónbrotin, tí eg helt meg hava gjørt nóg nógv. Og mítt mál er framvegis at endurvinna heitið sum heimsmeistari í tungvekt, segði Evander Holyfield eftir dystin móti russisku bamsuni.

Og Holyfield var ikki einsamallur um áskoðanina um, at hann var rætti vinnarin av dystinum. Ivaleyst hava kenslurnar eisini sítt at siga, tá slíkur dystur er á skránni. Men fleiri serfrøðingar kring allan heim siga, at talan var um sanna gølu.

Soleiðis skrivar boxing.com, at HM-beltið varð rænt frá Holyfield, og flestu aðrir miðlar skriva, at talan var um ein serstakliga linligan dyst, sum fekk eina kontroversiella dómaraavgerð.

SPEKT statsaut. revisorar
Correspondent Firm of KPMG International a Swiss Cooperative

## Bókhaldari

Fyri Kvívíkar kommunu søkja vit eftir einum bókhaldara, sum kann byrja sum skjótast.

**Talan er um eitt hálvtíðarstarv.**

### Starvið
Arbeiðið sum bókhaldari hjá Kvívíkar kommunu fevnir um:
- Allar vanligar bóhaldsuppgávur
- Avgreiðslu av lønum
- Gjalding av ognarum
- Gerð av roknskapum at leggja fyri kommunustýrið hvønn ársfjórðing
- Gerð av ársroknskapi
- Hjálp í sambandi við gerð av fíggjarætlan fyri kommununa

Talan er um eitt áhugavert og sjálvstøðugt arbeiði.

### Umsøkjarin
Umsøkjarin skal:
- hava royndir innan bókhalssyrkið, kunna arbeiða sjálvstøðugt,
- hava góð samstarvsevni og hava telduførleika.

Dentur verður lagdur á, at tann, ið settur verður er álítandi og fyrikomandi.

Lønin verður sett eftir nærri avtalu.

### Arbeiðstíð
Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna.

### Umsóknin
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til SPEKT, Staravegur 17, 100 Tórshavn.

Umsóknin skal verða SPEKT í hendi **skjótast til ber.**

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Mirjam Haraldsen hjá SPEKT á telefon 23 34 70 ella Bøje Christensen, borgarstjóra í Kvívíkar kommunu á telefon 21 02 94.

SPEKT statsaut. revisorar Spf. spekt@spekt.fo, www.spekt.fo
Staravegur 17, Postsmoga 3258 110 Tórshavn, Telefon 34 34 34, Telefaks 34 34 35
Heiðavegur 15, Postsmoga 190 600 Saltangará, Telefon 47 44 74, Telefaks 47 44 75

POLITI




## POLITIIÐ SØKIR EFTIR POLITISTAEVNUM!

Politiið er eitt av størstu arbeiðsplássunum í Føroyum. Talan er um sjálvstøðug størv við nógvum avbjóðingum. Høvuðsuppgávan hjá løgregluni er í stuttum:
- at vera sjónlig og skapa tryggleika,
- at fyribyrgja ósemjur og ófrið
- at kanna og uppklára
- at upplýsa og gera fyribyrgjandi arbeiði

Grundarlagið fyri løgregluarbeiðnum er virðingin fyri rættartrygdini. Atlitið til borgaran og samfelagið er altíð í miðdeplinum.

Lønin er kappingarfør frá fyrsta degi. Royndartíðin er trý ár, eftir tað fært tú fast starv. Møguleiki er fyri rúgvu av serskeiðum og trygdin í starvinum er góð. Møguleiki er eisini at flyta millum deildir og arbeiða ymsastaðni í landinum.

Eingi krøv eru um formliga útbúgving ella lívsroyndir. Men tú skalt hava fyritreytir fyri at loysa álagdar uppgávur í samsvari við reglur og virði í samfelagnum og við virðing fyri tí einstaka og rættindum hansara. Vit ynskja eisini eitt hóskiligt býti millum kvinnur og menn.

Tú skalt hava fylt 21 ár, hava føroyskan/danskan heimarætt, hava góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón, og eisini skalt tú hava koyrikort til persónbil.

Umsóknarfreist til upptøkuroyndirnar í vár, er sett til 30. januar 2009.

www.politi.fo
www.politi.dk
www.blivpolitibetjent.dk

VIKUBLAÐIÐ

FØROYA LANDFÚTI
Jónas Broncksgøta 17 · Postboks 3018 · 110 Tórshavn · tel 35 14 48